NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar

23. mai fingu Nanna og David Lukama, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4400 gr.

23. mai fingu Olivia og Jákup Súni Berg, Hoyvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2415 gr.

28. mai fingu Eydna Helena Mortensen og Eyðálvur Carlsson, Tórshavn eina dóttir. Hon vigaði 1655 g og var 44 cm long.

31. mai fingu Frida Kristina Johannesen, Argir, og Eyðun Skarðhamar, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

31. mai fingu Beinta B. og Frífinn Nolsøe, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

1. juni fingu Monrudee úr Vangrangnoi og Flóvin Petersen úr Vestmanna ein son. Hann vigaði 3300 g og var 50 cm langur. Navn hansara er Michal.

1. juni fingu Marta Tonnysdóttir Thomsen og Sámal Joensen, Norðragøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.

1. juni fingu Oddny Hansen og Piddi Olsen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4300 gr.

1. juni fingu Jana K. og Rói H. Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr. Hon eitur Erla.

2. juni fingu Jonna og Kári Hansen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

3. juni fingu Álvgerð Johannesen, Tvøroyri, og Tormann Jacobsen, Froðba, búsitandi í Haslev, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

Andlát

26. mai
Ingvard Eliasen, Leirvík, 91 ár.
28. mai
Mikkjal Páll Hovgaard, ættaður úr Hovi búsitandi í Tórshavn, 35 ár.
Dánjal Jákup Holm, Hvalba, bús. á Argjum, 88 ár.
Ásfríð Mortensen, ættað úr Norðragøtu búsitandi í Tolvsrød í Noregi, 74 ár.
30. mai
Hanna Binderup, ættað úr Mykinesi, búsitandi í Tórshavn, 82 ár
1. juni
Edelborg Seyer Rubeksen, fødd Seyer Hansen, ættað úr Hvalba búsitandi í Havn, 84 ár.

Dagurin

5. juni. Grundlógardagur, hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849.

Dagurin ber annars navnið **Bonifacius**. Hann var enskur munkur, sum var tiltikin trúboðari og fekk navnið ápostul Týsklands. 80 ára gamal varð hann saman við 52 øðrum myrdur av heidningum í Frísalandi hvítusunnudag ár 754.

Jákup Dahl varð føddur hendan dagin 1878 og deyður í 1944.

6. juni. Norbertus, deyður í 1134. Týskur aðalsmaður, sum stovnaði eina nýggja munkaskipan í Premontre í Fraklandi og seinni gjørdist biskupur í Magdeburg.

7. juni. Jeremias. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla Testamenti. Í Føroyum hevur navnið Geramíggjas verið brúkt.

Bibilska navnið merkir *tann av Guði upphevjaði.*

Minningarorð

Dánjal á Kjalnesi

25.07.1941 – 09.05.2004

Ein góður vinur og virkisfelagi, Dánjal á Kjalnesi, er farin. Ikki er tað mangan, at eg taki alment til pennin, heldur ikki tá ið tað snýr um týdningarmikil viðurskifti, sum at minnast góðar samstarvsfelagar og vinmenn. Men samanhald, virki og felagsskapur við Dánjal á Kjalnesi var av slíkum slag, at nøkur orð mugu sigast um henda megnar mann. Vit vóru saman um okkara seráhugamál, seyðin. Við hesum fingu vit so mangt annað gott saman og eitt serliga gott vinalag.

Dánjal bleiv sjúkur av herviligu kreftini. Hóast vit øll vónaðu, at Dánjal kundi komu burturúr hesum, at hann fór at vinna heilsuna aftur, bleiv tað ikki so. Vit vita øll, at slík sjúka er ikki tespilig, men ein vónar altið. Hvør skuldi trúð, at ein so prúður og megnarligur maður, ja tað var hann eisini í summar, skuldi fara so skjótt. Tíverri skuldi stutt tíð ganga. Dánjal fór alt ov tíðliga.

Eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir. Oftani er tað sagt, men orðatakið minnir okkum á hetta, og kann hetta vónandi verða við til at troysta tey, ið eftir sita. Soleiðis er tað bara, vit mugu taka við tí, hóast at tað kann verða sárt. Lagnan má góðtakast.

Dánjal var virkin, var uppií nógvum virksemi. Hann var bóndi, formaður í Jarðarráðnum, koyrdi mjólkarbilin, koyrdi buss og mangt annað. Hann var fjøltáttaður. Eg var so heppin at koma at kenna hann í einum av hansara lívstættum. Vit báðir, Dánjal komu at kennast í sambandi við seyðasýningar. Eg og hinir í seyðasýningahøpi vilja við hesum minningarorðum minnast virkisfelagan og heilsa honum fyri seinastu ferð.

Dánjal hevði sera gott hegni til seyð og alt tað, sum er knýtt at seyðahaldi. Felagsáhugin fyri seyðahaldi knýtti okkum saman. Men tað var meira enn hetta, sum knýtti okkum saman. Dánjal var ein góður vinur.

Hóast at Dánjal fyri tey, sum ikki kendu hann, so væl kundi tykjast álvarsamur, var hann í grundini skemtingarsamur og lunur maður, ein heitt menniskja við positivari og sterkari grund.

Dánjal var ein maður av fáum orðum, men tað hann segði, vigaði. Tað er tí kanska ikki so undarligt, at hann hevði stóran týdning har hann var, eisini í seyðasýningahøpi.

Tá ið vit fóru avstað um morgnarnar, var steðga á gólvinum hjá Emily og Dánjal til morgumdrekka. Ein temunn við øllum góðum føroyskum viðskera aftur við. Tað kendist at vit vóru á gólvinum hjá einum bóndahjúnum - tað var sera hugnaligt. Betri byrjan á ein seyðasýningardag kann ein ikki hugsa sær. Emily, tøkk fyri góðan sýndan blíðskap.

Dánjal og konan dugdu at motivera og skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi.

Síðan var farið avstað til staðin har seyðasýningin skuldu ganga fyri seg.

Leikluturin hjá Dánjali var týdningarmikin her. Tað altíð ein styrkur at hava Dánjal við í teaminum.

Seyðasýningarnar vóru ein heildaruppliving, har seyður og seyðagóðska var í miðdeplinum. Men tað sosiala lívið, hugnin og samveran var av stórum týdningi, og leiklutur Dánjals lá ikki eftir.

Seinast Dánjal var við á seyðasýning, var seinasta heyst á Sandoynni (Skálavík). Vit vóru so smátt byrjaðir at leggja ætlanir um seyðasýningar komandi heyst. Men lagnan vildi tað soleiðis, at Dánjal skuldi ikki verða við meira. Hvør skuldi trúð tí? Men hetta mugu vit bara góðtaka, soleiðis er lívið.

Tað verður sagt at maður kemur í mans stað, men Dánjal verður ikki lættur at erstatta. Saknur verður í honum. Men vit skulu royna at varðveita tann góða anda, sum Dánjal førdi við sær, í seyðasýningum í framtíðini.

Familjan hevur mist ein kæran, Kollafjørður ein son og samfelagið eitt mentað og gott menniskja.

Vit vilja takka Dánjali fyri tað, vit hava havt saman hesi árini.

Vit vilja sýna tær Emily, synum, dóttur og abbabørnum okkara størstu samkenslu.

Vit lýsa frið yvir minnini um Dánjal á Kjalnesi.

Poul

Kim Røsvik, Tórshavn:

Stovnað felagið »Ungdómsráðgeving í Havn«

Kim Røsvik í Havn hevur stovnað felagið "Ungdómsráðgeving í Havn", har málbólkurin er tey ungu millum 10 og 16 ár. Kim, ið er 25 ára gamal, er føddur í Føroyum, hann búði nøkur ár í Danmark, har hann m.a. ansaði børnum á einum barnagarði og var hjálparlærari í einum forskúla.

Fyri hálvumtriðja ári síðan byrjaði hann sína egnu ungdómsráðgeving í Havn. Hann tosar við tey ungu og foreldur teirra, og tey kunnu venda sær til hansara við ymiskum spurningum. Ætlanin er eisini at vitja aðrastaðni í landinum.

Kim kundi hugsað sær at eitt pláss var í býnum til tey ungu, serliga um kvøldarnar og um næturnar.

Kim Røsvik hevur stovnað felagið »Ungdómsráðgeving í Havn«

Mynd: Jens Kristian Vang

Hann hevur gjørt eina kanning millum tey ungu, um hvat tey ynskja sær o.l.

Nógv kundu t.d. hugsað sær at íðkað ítrótt, uttan at tað endiliga skal vera ein kapping um at vera best. Soleiðis at øll kunnu vera við.

Ungdómsráðgevin takkar øllum, sum hava stuðlað tiltakinum, og vónar hann at fáa eins gott samstarv í framtíðini. Stórur tørvur er á ungdómsráðgeving, og Kim hevði ynskt at fleiri sjálvboðin høvdu vilja tikið lut.

Kim Røsvik sigur, at tað er ókeypis at vera limur í felagnum "Ungdómsráðgeving í Havn", og hann leggur serligan dent á anonymitet.

Telefonnummarið hjá felagnum er: 503161

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jofrid Skarhamar:

Doktaraheiti frá Tromsø Universitet

Jofrid Skarðhamar, sum er hálvføroysk, hevur vart sína doktararitgerð á Norges Fiskerihøskole, Universitet i Tromsø. Hon hevur kannað hvat ávirkar vatnið uppi í sjónum við Norðurnorsku strendurnar.

Jofrid kemur frá Akerhus í Norra. Hon er 31 ára gomul, dóttir Torfinn Skarðhamar úr Havn. Omman og abbin vóru Ingeborg, f. Poulsen, og Oddmar Skarðhamar, som var føroyskur sendimaður í Aberdeen í mong ár.

Hon er utbúgvin cand. scient. í fysisk oseanografi á universitetinum í Bergen. Verkætlanin er fíggjað av Norges Forkningsråd og NFH. Dagliga arbeiðir Jofrid sum granskari og ráðgevi á Akvaplan-niva í Tromsø.

Eli Davidsen 70 ár

Í dag, grundlógardagin 5. juni, fyllir Eli Davidsen í Dianalund, fyrrverandi stjóri á Arbeiðseftirlitinum, 70 ár.

Eli er strandingur, hann bleiv útbúgvin maskinmeistari í 1960 og sigldi við skipum hjá A.P. Møller til 1962, tá hann fekk starv á projekt-teknistovuni Nordiske Kabel- & Tråd í Glostrup. Har arbeiddi hann til 1977, tá hann flutti heim aftur til Føroya og varð settur sum fyrsti stjóri á Arbeiðseftirlitinum, sum tá varð sett á stovn.

Arbeiðseftirlitið var tá ein stovnur undir teknisku deild hjá Føroya Landsstýri. Síðan 1984 hevur Arbeiðseftirlitið verið ein sjálvstøðugur stovnur.

Í 2001 legði Eli frá sær sum stjóri á Arbeiðseftirlitinum, sum 67 ára gamal. Tá fluttu hann og konan til Danmarkar at búgva. Tey búgva í Dianalund, sum er millum Slagelse og Kalundborg á Vestursælandi.

Eli er føddur og uppvaksin á Strondum, foreldrini vóru: Malena, f. Hansen, ættað úr Funningi, og Johannes Davidsen, ættaður úr Haldarsvík.

Hann er giftur við Arndis, dóttir Giggu, f. Joensen, og Karl Mouritsen, í Havn. Tey eiga tvey børn: Joan, 43 ár, sum eisini býr í Dianalund, og Ragnvaldur, 37 ár, sum býr í Ålsgårde í Norðursælandi. Arndis og Eli eiga trý ommu- og abbabørn.

Føðingardagurin verður hildin saman við familju, vinum og kenningum. Adressan er: Møllemarkvej 28, DK-4291 Ruds Vedby, tlf. 0045 58262292.

Torbjørn Olsen í Gallarí Oynni

Sunnudagin 6 juni kl 16 letur Gallarí Oyggin upp við nýggjari listaframsýning. Tað er Torbjørn Olsen, ið skal sýna fram. Hendan sýningin verður at síggja hvønn dag frá 15-20 fram til 28. Juni.

Í Café Art, sum hevur opið allar dagar frá 15-20, verður tað Palle Julsgart, ið sýnir fram.

eys

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya:

Sjúkrarøktarfrøðingar fingið prógv

Mikudagin 26. mai fingu 18 sjúkrarøktarfrøðingar prógv á Sjúkrøktarfrøðiskúla Føroya. Prógvini vórðu handaði á samkomu í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Við tað at okkurt av nøvnunum manglaði, tá myndin var í blaðnum seinasta leygardag, er myndin aftur í blaðnum í dag.

Aftara rað f.v. Ingibjørg Abrahamsen, Tórun P. Borentzvige, Bárða Eyðbjørg Brandsdóttir, Maibritt Wolles Djurhuus, Borghild á Fløghamri, Diana M. Hansen, Paula Jacobs, Aslaug Joensen, Durita Joensen, Dóra D. Johansen.

Fremra rað f.v. Elsa Lamhauge, Inga Magnussen, Regina M. Midjord, Jana Mortensen, Súsanna Olsen, Guðni Remberg, Ása Malan Samuelsen, Annika Strøm.

Mynd: Jens Kristian Vang

Brúðleyp

Í dag, 5. juni, kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Guðrun Guðjónsson og Pætur Niclasen.

Í dag, 5. juni, giftast Elsebeth Joensen, Fuglafjørður, og Óttar á Lofti, Sandavágur. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16.00. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.30.

Prógv

Svenn Eysturtún Olsen var avlærdur sum tænari 30. apríl á Le Sommerlier í Keypmannahavn.

60 ár síðan Jákup Dahl, próstur, doyði

Á sínum 66 ára føðingardegi andaðist Jákup Dahl, próstur, hin 5. juni í 1944. Hann var føddur í Vági í 1878. Fimtan ára gamla fór hann á læraraskúla í Havn, har hann tók prógv trý ár seinni. Síðani fór hann til Danmarkar á studentaskúla og síðani at lesa gudfrøði.

Afturkomin til Føroya starvaðist hann sum lærari í Havn, til hann í 1912 gjørdist prestur í Suðurstreymoy. Eftir at A. C. Evensen doyði í 1917, gjørdist Jákup Dahl í 1918 Føroya próstur – og røkti starvið til sín deyðadag. Hann búði í prestagarðinum í Sandágerði. Jákup Dahl er kendur fyri sítt virksemi málinum at frama, bæði sum skald og lærubókahøvindur – og ikki at gloyma sum bíbliutekstatýðari. Jákup Dahl hevur yrkt og týtt ein hóp av sálmum í Sálmabókini.

Tøkk

Hjartaliga takk fyri heilsanir í sambandi við 70 ára føðingardag mín.

Áki Dimon

Tøkk

Hjartans tøkk øll somul, sum á ymiskan hátt vístu okkum tykkara samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaði maður, pápi, sonur, beiggi og svágur

Sjúrður Højgaard Eliasen

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Jóannis Fonsdal prest og kirkjutænarar.
Eisini ein tøkk til familju, vinir og kenningar og annars allar hjálpandi hendur til jarðarferðina.
Ein serliga tøkk til Eysturskúlan og til starvsfelagar mínar á Almannastovuni.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til børnini.
Takk til tykkum mongu, sum fylgdu Sjúrða til hansara seinasta hvíldarstað.

Vegna tey avvarðandi
Susanne og børnini